

## Konsertfelagið skipar fyri konsertum við klaverleikara

Nýggj nevnd er sett í Konsertfelagnum, og nýggja nevndin hevur longu stáplað fyrstu konsertirnar upp á beinini. Fyrstu konsertirnar, sum nýggja nevndin í Konsertfelagnum, Ann Mari Hentze, kassameistari, Jakku Heinesen, Birgitte Schnakenburg, Helga Gerðalíð og Gudmund Mortensen, formaður, fyriskipar, verða í næstu viku við klaverleikaranum Torsten Juul-Borre. Torsten Juul-Borre er sera virkin sum konsertpianistur, bæði í Evropa og USA, eisini hevur hann spælt konsertir á fleiri av gomlu, søguligu orglunum í Evropa. Torsten Juul-Borre fer at spæla verk av Edvard Grieg, Maurice Ravel, Frederic Chopin og eina sonatu av ungaranum Frederic Balazs. Konsertirnar verða hósdagin 3. september klokkan 20 í Mentunarhúsinum í Fuglafirði og leygardagin 5. september klokkan 16 í Norðurlandahúsinum.



# Kaj Leo skal vera løgmaður

**Honum á baki kemur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi og Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fimti hvør veljari vil hava Kaj Leo Johannesen til løgmann. Tað sigur í øllum førum feskasta veljarakanningini, sum Kringvarpið kunngjørdi í gjár.

Sambært kanningini hevur Kaj Leo Johannesen vunnið sær álit hetta lítla árið, hann hevur verið løgmaður, um enn ikki hann hevur vunnið so stórt álit millum veljararnar annars, sum flokkur hansara, Sambandsflokkurin. 20,7 prosent vilja hava Kaj Leo Johannesen til løgmann, men sjey prosent fleiri velja Sambandsflokkin.

Næstur í røðini í løgmansvalinum, er nú Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi. 14,5 prosent av veljarunum vilja hava hann til løgmann, og tað ikki meira enn gott og væl helvtin av teimum, sum velja Tjóðveldi.

Jóannes Eidesgaard, sum er tann sum hevur sitið longs sum løgmaður í hesari øldini, fær stuðul frá 10 prosentum, sum vilja hava hann aftur í løgmansstólin.

Eingin annar er við í kappingini, tí formaðurin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen fær einans stuðul frá 3,8 prosentum av veljarunum, meðan hann innanfloks verður yvirhálaður av Anfinni Kallsberg, fyrrverandi løgmaður, sum fær 6,7 prosent av atkvøðunum í veljarakanningini.

Jenis av Rana og Kári P. Høgjaard, formenn í Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum fáa stuðul frá ávikavist 0,4 og 0,2 prosentum.

# Javnaðarflokkurin fær av at vita



VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Veljararnir geva Javnaðarflokkinum ein harðan lúsing, um veljarakanningin hjá Fynd, sum útvarpið hjá Kringvarpinum kunngjørdi í gjár, er eftirfarandi.

Við seinasta løgtingsval fekk Javnaðarflokkurin eitt vánaligt úrslit, og misti flokkurin eitt av sínum sjey tingfólkum. Men sambært veljarakanningini, so kann flokkurin vænta sær eitt nógv verri úrslit, einans 14,4%. Bert tvær ferðir áður hevur flokkurin fingið eitt verri úrslit, tað var í 1932, tá flokkurin fekk 10,5% og fyrstu ferð flokkurin stillaði upp, í 1928, tá flokkurin fekk 10,6%.

Slakasta valið í nýggjari tíð var katastrofuvalið í 1994, tá flokkurin fór úr 27,5% niður í 15,4%.

Aðrar veljarakanningar, sum gjørdar eru síðani løgtingsvalið 19. januar 2008, benda eisini á, at Javnaðarflokkurin fær stóra afturgongd.

# Sambandsflokkurin størsti flokkur á tingi

**Um val var í dag hevði Sambandsflokkurin verið nógv størsti flokkurin á tingi við níggju tingsessum**

VELJARAKANNING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Veljarakanningin sum Fynd hevur gjørt fyri Kringvarpið vísir, at Sambandsflokkurin hevur verið nógv størsti flokkur á tingi í dag. Sambandsflokkurin fær í kanningini 27,7 prosent, sum er ein framgongd upp á 6,7 prosent. Við seinasta val fekk Sambandsflokkurin 21 prosent og sjey tingfólk. Hevði val verið í dag fekk flokurin níggju tingfólk.

Tjóðveldisflokkurin, sum er størsti andstøðuflokkurin, stendur sambært kanningini so at siga í stað. Við seinasta val fekk flokkurin 23,3 prosent, meðan hann sambært kanningini hevði fingið 23,1 prosent, ella eina afturgongd upp á 0,2 prosentstig – og hann hevði varðveitt síni átta tingfólk, og hevði verið næststørsti flokkurin á tingi.

Fólkaflokkurin hevði verið triðstørsti flokkurin á tingi, um val var nú. Fólkaflokkurin fær sambært kanningini 19,8 prosent av atkvøðunum og varðveitir síni sjey tingfólk. Men talan er um eina afturgongd upp á 0,3 prosentstig.

Teir báðir smáu flokkarnir á tingi, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin ganga báðir aftur í kanningini. Miðflokkurin fer úr 8,4 prosentum til 8,4 prosentum niður í 8,1 og missir ein av sínum trimum tingsessum. Sjálvstýrisflokkurin fær 6,9 prosent ímóti 7,2 við seinasta val og varðveitir sínar báðar tingsessir.

941 fólk vóru spurd í kanningini.

kelda: www.kringvarp.fo

# Útróðrarflotin skal fiska uttan avmarkingar

Á aðalfundi hjá Klaksvík Útróðrarfelag í kvøld var nýggj nevnd vald, og kjakast varð um ymisk viðurskifti hjá útróðrarflotanum. Fundurin samtykti eina almenna áheitan á landssins myndugleikar. Klaksvíkar Útróðrarfelag hevur sent opið bræv:

- Klaksvíkar Útróðrarfelag vil hervið heita á Meginfelag Útróðrarmanna um at gera sína ávirkan galdandi, so at landsins myndugleikar loyva útróðrarflotanum framhaldandi at fiska uttan avmarkingar, sigur Klaksvíkar Útróðrarfelag í opnum brævi í kvøld.



*Klaksvíkar Útróðrarfelag: Klavus Bjartalíð, Finn Jacobsen, Hjalmar Joensen, Jógvan Páll Steinberg, Ólavur Ó. Poulsen, Jón Kári Høgnesen, Eyðolv Vang - vantar á myndini*

*(Mynd: Dávur Winther)*